# Umhugsa tilboðið frá býráðnum



*Leiðslan í Ebenezer hevur fingið tilboðið frá býráðnum um at keypa bygningin. Í løtuni verður tilboðið umhugsað*

EDVARD JOENSEN

Samkoman í Ebenezer í havn hevur fingið tilboðið frá býráðsformanninum til umhugsunar.

Býráðsformaðurin hevur skotið upp, at Tórshavnar Kommuna og Brøðrasamkoman í Havn gera gerabýti soleiðis, at býráðið fær Ebenezer í miðbýnum, í móti at samkoman fær annað stað í kommununi at byggja samkomuhús á.

Osvald Kjærbo, sum er við í leiðsluni í Ebenezer, sigur, at tilboðið er latið samkomuni til umhugsunar, men enn er als einki avgjørt, hvussu verður. Hann sigur, at fleiri meiningar eru um, hvørt tað er rætt at fara úr samkomuhúsinum, sum fólk eru vorðin góð við.

Hinvegin hevur tað verið upp á tal í samkomuni at flyta aðrastaðni fyri líkasum at koma nærri teimum støðunum, har fólk býr. Tí ein sannroynd er, at so at siga øll skulu ferðast, skulu tey á møti í Ebenezer. Nevnd hava verið øki í útjaðaranum sum til dømis í Hoyvík.

Men Osvald Kjærbo leggur tó dent á, at als einki er avgjørt, um tikið verður av tilboðnum frá býráðnum, ella kanska okkurt heilt annað verður gjørt.

»Tað má tað yngra ættarliðið fara at gera av«, sigur Osvald Kjærbo. »Tað verða tey, sum skulu føra samkomuna víðari.«

# Útlitini eru hampilig

*Hóast útflutningurin fer at minka í nøgd, eru útlitini fyri, at virðið fer at standa við hampilig, heldur føroyskur fiskaseljari*

EDVARD JOENSEN

Hóast fiskanøgdirnar eru minkandi, heldur stjórin á Fiskavirkinum í Gøtu ikki, at vit eiga at óttast alt ov nógv, at prísirnir eisini lækka.

Páll Gregersen metir, at prísirnir eiga at fara at halda sær. Stutt og greitt tí føroyingar eru vorðnir so dugnaligir at arbeiða og selja góðan fisk, at keyparin vil gjalda fyri hann.

Páll Gregersen sigur, at áðrenn føroyingar fingu marknaðarbúskap í fiskaútflutningin, lógu prísirnir hjá okkum á eini beinari linju, meðan prísirnir á marknaðunum úti í heimi svingaðu. Viðhvørt yvir og viðhvørt undir okkara. Men varð tann svingandi strikan trekt bein, vísti tað seg, at hon kom at liggja oman fyri okkara.

Men nú er øðrvísi. Nú eru føroysku prísirnir knappliga støðugt hægri enn prísirnir á europeisku marknaðunum. Og tað er tí, at vit duga tað, vit gera. Bæði at hagreiða og selja fisk, sigur Páll Gregersen.

Ein sera týdningarmikil hending fyri føroyska fiskasølu er, sigur Páll Gregersen, at vit duga so mikið væl at selja, at vit eru komnir heilt út til brúkaran. Soleiðis eru vit slopnir av við teir mongu millumhandlararnar, sum fóru við stórum parti av vinninginum.

Hann nevni nakrar soleiðis í eini handavending, sum eru farnir av knóranum. Og hann letur líkasum skilja, at tað er tí, at teir fáa ikki ta tilføring, sum millum annað føroysk virki góvu teimum fyrr.

Um verandi fiskaprísirnar, sum fleiri siga vera óvanligar, sigur Páll Gregersen, at tað eru teir eisini. Í mun til tað, vit vóru von við fyrr. Men nú hava vit sjálvir arbeitt hesar prísirnar upp, og mugu fyri alt í verðini ikki slaka við góðsku og ágangandi sølutiltøkum. Vit mugu altíð syrgja fyri at hava bestu vøruna og duga at sleppa av við hana á rætta stað. So fara prísirnir nokk at halda, metir Páll Gregersen, stjóri á Fiskavirkinum í Gøtu.



*Longu fyrsta túrin um til Suðuroyar týskvøldið, var Claymore ov lítil, tí nakrir bilar stóðu eftir. Ímillum teirra var mjólkarbilurin, so suðuroyingar fingu onga mjólk fyrrenn í gjárkvøldið. Men á Strandferðsluni vænta tey, at proppur kemur í um vikuskiftið, tá í ferðslan økist munandi.*

# Tað er einki at siga til at fólk eru eitt sindur ill

*Telefonstormur á Strandferðsluni í gjár bendir á, at nógv ivamál eru, nú Claymore er farin at røkja suðuroyarsiglingina ístaðin fyri Smyril. Men yvirhøvur hevur tað gingið hampiligt, sigur stjórin á Strandferðsluni*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Yvirhøvur hevur tað gingið hampiligt.

Stjórin á Strandferðsluni, Reidar Nónfjall, sigur, at tað fyribils hevur tað ikki verið tann ruðuleikin í suðuroyarsiglingini, sum nógv høvdu frykta fyri, nú enda ferjan, Claymore, er sett at søkja rutuna ímeðan Smyril er á beding.

–Men sjálvandi hevur mangt og hvat verið, sum ikki er gingið eftir vild, men yvirhøvur hava tær fyrstu royndirnar gingið hampiliga.

At hann hevur rætt í, at alt ikki hevur gingið eftir vild, skilst eisini av tí, at í gjár var at kalla telefonstormur á Strandferðsluni, so tað var sera trupult at sleppa ígjøgnum í telefonini.

–Tað er Claymore, sum fólk ringja um, segði ein telefondama í eini stuttari viðmerking.

Hon segði, at summi ringdi at spyrja, onnur kærdi seg um, at tey kendi eg illa viðfarnan, tí tey vóru ikki sloppin við og uppaftur onnur ringdi beinleiðis at skeldast.

Reidar Nónfjall sigur, at tað var ikki annað enn væntandi, at ymsar óhepnar støður fóru at taka seg upp, tá ið bæði ferðafólk og vinnulív so brádliga skulu venja seg við eitt skip, sum bara hevur helvtina av tí kapasiteti, sum Smyril hevði.

– Tað er onki at siga til, at fólk verða ill, tá ið tað ikki gongur eftir vild og tey ikki sleppa aftur og fram, sum tey vilja. Tað er ein púra natúrlig reaktión,

Men Strandferðslustjórin sigur, at tey flestu, sum ringja, hava onkrar spurningar, sum tey so fáa svaraðar.

– Og yvirhøvur eru fólk stak hampilig at hava við at gera, hóast støðan er forargilig. Og tey, sum eru eitt sindur heit, sissast eisini sum allaroftast, tá ið vit hava greitt teimum frá, hví støðan bleiv sum hon er blivin. Tað er nevniliga tí, at vit fingu ikki pening játtaðan frá løgtinginum í nóg góðari tíð til at vit kundu útvega eitt meiri hóskandi avloysaraskip fyri Smyril, sigur Reidar Nónfjall.

Hann leggur afturat, at støðan er ikki bara óheppin hjá ferðafólki og vinnulívi.

– Hetta er eisini stak óheppið hjá Strandferðsluni, tí tann óvissan, sum hevur tikið seg upp, krevur rættiliga stóra eyka arbeiðsbyrðu, fyri at fáa pusslispælið at ganga upp sum frægast

## Royna sum frægast

Og Strandferðslan roynir alla tíðina at finna loysnir fyri at fáa tað at ganga sum frægast.

Eitt nú hevur verið funnist at, at suðuroyingar ikki sleppa við flogfarinum fýra dagar um vikuna, tí Claymore er so seint á Havnini.

–Hendan trupulleikan hava vit loyst við at seta ein lítlan buss í rutu til suðuroyingar burturav, sum skulu við flogfarinum.

Hesin bussurin kemur væl skjótari fram enn tann stóri, so tað gongur, um Claymore ikki er ov nógv seinkað.

Hendan loysnin varð roynd longu í gjár við góðum úrsliti.

## Nakrir bilar eftir

Tá ið hesar reglur verða skrivaðar, hevur Claymore siglt tríggjar túrar ímillum Havnina og Suðuroynna.

– Fyrsta túrin, týskvøldið, var biladekkið fult og nakrir bilar stóðu eftir.

Millum teirra var mjólkarbilurin, so suðruoyingar fingu onga mjólk í gjár. Men hann slapp so suður á miðdegi í gjár, so mjólkin kom í handlarnar út ímóti kvøldinum.

Tá skal eisini havast í huga, at hetta var einasti túrur suður týsdagin, so farmurin var serliga nógvur.

–Á túrinum av Drelnesi til Havnar var hinvegin pláss fyri einum trimum bilum afturat umborð og á túrinum suðuraftur á miðdegi í gjár, var pláss fyri átta bilum afturat.

Ferðafólkatalið hevur verið lítið, ímillum 27 og 84 ferðafólk við hvønn túr.

Reidar Nónfjall sigur, at ein frágreiðing er uttan iva tað, at fólk setast aftur, tí tey vænta ikki at sleppa við, og í hvussu so er, lata tey bilin standa.

–Fólk laga seg til umstøðurnar og tað ger, at tað gongur so frægt, sum tað ger.

Annars stendur vikuskiftið fyri stavni nú og strandferðslustjórin er spentur upp á, hvussu tað fer at gangast, tí tað er ongin ivi um, at tað verður ein fløskuhálsur, ikki minst, tá ið hugsað verður um, at eisini fríggjadagurin er heilidagur.

Annars ber til hjá teimum at, sum hava serligan tørv, at bíleggja pláss við Claymore.

– Talan kann vera um fólk, sum skulu við Norrønu við bili. Talan kann eisini vera um vinnulívsfólk, har tað fær avleiðingar, um tey ikki sleppa við, ella tað kunnu vera onnur dømi.

– So fer tíðin at vísa, um tað er skilagott at víðka hesa tænastuna til eisini at umfata persónbilar og farm yvirhøvur.

Reidar Nónfjall sigur, at er tað nakar, sum hevur serligan tørv, eru tey vælkomin at ringja.

– So royna vit at loysa trupulleikan, um tað ber til.

## Vita, hvussu leikur fer

Annars er reidar Nónfjall ikki uttan víðari sinnaður til at lata Claymore sigla ein túr afturat, so at hon siglur ein farmatúr um náttina.

– Lat okkum nú fyrst síggja, hvussu tað gongur, áðrenn vit leypa framav.

– Men verður tað heilt galið, eru vit sinnaðir at hyggja uppá tann møguleikan við positivum eygum eisini, sum hann málber seg.






# Starvsfólk til Kaupthing Føroyar

**Hin 1. mars 2000 varð Kaupthing formliga virkið í Føroyum. Síðan hava Føroya Sparikassi og Kaupthing hf. í felag stovnað felagið Kaupthing Føroyar. Kaupthing Føroyar bjóðar fram tænastur innan handil og ráðgeving á virðisbrævamarknaðunum. Ætlanin er eisini at luttaka í uppbyggingini av einum føroyskum virðisbrævamarknaði og við tíðini luttaka í eini væntaðari privatiseringstilgongd í Føroyum.**

## Byggja upp nýggja vinnu

Sum starvsfólk í Kaupthing Føroyar hevur tú møguleikan fyri at verða við til at byggja upp eina nýggja vinnu í Føroyum. Vit luttaka hvønn dag á altjóða fíggjarmarknaðunum innan handil og ráðgeving á lánsbræva- og partabrævamarknaðunum. Okkara kundar eru føroyskir stovnar, virkir og privatfólk.

Áhugin fyri hesum virksemi hevur síðan byrjanina verið sera stórur, og Kaupthing Føroyar er longu nú størsti útbjóðarin av hesum tænastum í Føroyum. Hetta merkir samstundis eisini, at okkum skjótast gjørligt tørvar fleiri fólk.

## Virðisbrævahandlari/ognarrøkil

Áhugin at handla virðisbrøv í Føroyum er so stórur, at vit hava brúk fyri einum fólki til:

- Ráðgeving og handil av virðisbrøvum fyri privatar og vinnuligar kundar
- Uppsøkjandi sølu mótvegis størri kundum
- Røkt av verandi avtalum við kundar

Førleikakrøv

Tú skalt helst hava eina hægri búskaparliga útbúgving og hartil starvsroyndir innan virðisbrævaøki, men tað hevur størst týdning, at tú hevur:

- Royndir við kundarøkt
- Ein sjálvstøðugan arbeiðshátt
- Góð samstarvsevnir

## Umsitingarleiðari

Virksemi okkara er vorðið so umfatandi, at neyðugt er við einum ábyrgdarfólki at hava ábyrgdina av:

- Fíggjarstýring og roknskapi felagsins
- Uppbygging og viðlíkahaldi av mannagongdum
- Backoffice — t.e. avgreiðslu av virðisbrævahandlum
- Stýring av gjaldføri
- Felags við stjóran at hava ábyrgdina av umsiting felagsins annars

Førleikakrøv

Umsitingarleiðarin skal hava eina hóskandi útbúgving og hartil starvsroyndir, men tað hevur størst týdning, at tú hevur:

- Evnir at samskipa og raðfesta arbeiði
- Ein sjálvstøðugan arbeiðshátt
- Góð samstarvsevnir

## Fólk til umsitingina

Saman við umsitingarleiðaranum verða dagligu ábyrgdarøki tíni:

- Backoffice — t.e. avgreiðsla av virðisbrævahandlum
- Avgreiðsla av posti og telefon
- Stýring av gjaldføri
- Fyrisiting av bókhaldi felagsins

Førleikakrøv

- Skrivstovuútbúgving ella líknandi
- Verða vanur KT-nýtari
- Ein sjálvstøðugan arbeiðshátt
- Góð samstarvsevnir

Øll størvini verða sett skjótast gjørligt. Fyri størvini verður lønin ásett eftir avtalu. Umsókn við prógvum, CV og hartilhoyrandi skjølum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 27. mai 2000. Umsóknirnar, sum verða viðgjørdar í trúnaði, skulu sendast til:

Kaupthing Føroyar
Postboks 3090
110 Tórshan
ella á e-mail: peter@kaupthing.com

Nærri upplýsingar fáast um størvini við at venda sær til Peter Holm á telefon 351500.

SANSIR TEL 355355

KAUPTHING
FØROYAR
Postboks 3090 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com